LM-016/2023

Fylgiskjal 16

ETISKA RÁÐIÐ

Ummælisskriv til uppskot til broyting í revsilógin (kap 1-11)

Etiska ráðið takkar fyri møguleikan at koma við viðmerkingum til uppskot til broyting í revsilógini (kap 1-11). Sum heild metir Etiska ráðið, at endamálið við uppskotinum er gott. Tað er gott, at umseta lógartekstin til føroyskt, so tað er lættari hjá borgarum í Føroyum at skilja tekstin, og tær broytingar, sum verða gjørdar, eru somuleiðis góðar.

Broytingarnar í kapittul 2 og 6 hava vit ongar viðmerkingar til.

Broytingarnar í kap. 7 – treytað fongsulsrevsing

Etiska ráðið metir, at broytingarnar í kapittul 7 eru góðar. Tað er gott at strika møguleikan fyri treytaðum dómi uttan at áseta revsing. Tað eru tvær orsøkir til hetta. Tann fyrra er, at tað er rættast at tann dømdi fær at vita alt fyri eitt hvør revsingin er. Einhvør persónur, eisini ein persónur dømdur fyri lógarbrot, eigur at fáa slíka vitan sum skjótast, heldur enn at tað hongur yvir persóninum sum ein ókendur møguleiki onkuntíð. Hin orsøkin er, at hin dømdi eigur at dømast fyri brotsverkið dómurin er fallin um, ikki eitt brotsverk, ið er framt seinni. Aktørarnir í rættarskipanini eru menniskju, og tí kann ein væl ímynda sær støður, har aktørarnir lata seg ávirka av brotsverkinum, ið er framt seinni, tá um ræður dómsásetingina av tí, ið ein er treytað dømdur fyri. Harumframt skilja vit á lagnum, at í praksis hevur møguleikin at áseta treytaðan dóm uttan revsing ikki verið brúktur, og tí gevur tað eisini út frá tí góða meining at strika ásetingina.

Broytingarnar at økja um samfelagstænastu og minka um frælsistøku metir Etiska ráðið eisini eru góðar. Meira stendur um orsøkirnar til tað í viðmerkingunum til kapittul 8.

Broytingarnar í kap. 8 – samfelagstænasta

Etiska ráðið metir at uppskotnu broytingarnar um at økja nýtsluna av samfelagstænastu, har tað annars hevði verið nýtt treytaleys fongsulsrevsing, eru góðar. Vísindaliga er ógvuliga greið semja um, at rehabilitering loysir seg munandi betri enn fongsulsrevsing. Um nakað ger hetta seg helst í uppaftur størri mun galdandi í Føroyum, havandi í huga at fangarnir við longri revsingum sita revsingina í Danmark, og sostatt hava avmarkað samband bæði við myndugleikar, viðgerðartilboð og familju í Føroyum. Undir teimum umstøðunum eru sannlíkindini tíverri stór fyri, at fyrrverandi fangar fara í somu gomlu mynstrini aftur, tá teir koma aftur til Føroyar – og fleiri dømi eru um fyrrverandi fangar, ið hava tikið sterk sambond til donsk kriminel umhvørvi við heim til Føroyar.

Etiska ráðið • er@er.fo • J.C.Svabosgøta 43 • 100 Tórshavn • tlf: 219484 • www.etiskaradid.fo

Tá eru tað væl betri fortreytir fyri, at fólk, ið verða dømd, kunnu rehabiliterast, um tey verða dømd at gera samfelagstænastu í Føroyum, og samstundis fáa dygdargóð tilboð og hjálp til at koma á rætta leið aftur. Í so máta er tað eisini gott, at 1/3 av samfelagstænastuni kann vera útbúgving ella viðgerð fyri avbjóðingar tann dømdi hevur. Um sama mundið er tað eisini rætt í sjálvum sær, at fólk fáa møguleikan at rætta upp á tann órætt tey hava framt, við at fremja samfelagstænastu. Tað er væl meira virði í tí, at ein persónur sum revsing skal geva aftur til samfelagið, heldur enn at samfelagið skal rinda fyri at persónurin situr fongslaður.

Eina greiða undantakið er tá um ræður fólk, ið eru til vanda fyri onnur. Tað hevði helst framvegis verið lættari at rehabilitera persónarnar, men eru tey aktivt til vanda fyri onnur undir teirri tilgongdini, so viga tey atlitini tyngri. Broytingarnar taka tó hædd fyri hesum, soleiðis at hesin bólkurin av fólki ikki eru fevnd av teimum, men at tað heldur serliga snýr seg um fólk, ið ikki hava framt brotsverk fyrr, ella eru yngri enn 18 ár.

Ein onnur avbjóðing kann vera tá um ræður rættvísiskensluna hjá fólki. Er talan um brotsverk, har persónar onkursvegna hava gjørt seg inn á ein annan, so kann tað vera ein avbjóðing, at samfelagstænasta ikki verður sæð sum ein eins hørð revsing og frælsistøka. Følir tann ella tey órættaðu ikki, at revsingin er samsvarandi við brotsverkið, so kann tað skapa misálit á skipanina, og kann gera at summi sløg av brotsverkum í minni mun verða meldaði, tí fólk kortini ikki rokna við eini "veruligari" revsing.

Tískil hevði tað helst verið skilagott, at ikki bara fremja broytingina, men at eisini samstundis hava góðar almennar grundgevingar fyri, hví tað er ein fremur broytingina. Ein møguleiki er at hava eitt átak ella ráðstevnu, har ein kemur inn á fyrimunirnar við rehabilitering mótvegis frælsistøku, týdningin av at fólk kunnu geva aftur til samfelagið og – tó at tað etiskt kanska hevur minni týdning – hvussu nógv bíligari tann loysnin er fyri samfelagið. Samstundis er tað nokk eisini týdningarmikið at leggja dent á, at broytingin ikki snýr seg um, at fólk skulu sleppa undan frælsistøku, tá um ræður ógvusligan ágang móti øðrum.

Etiska ráðið fekk ikki Forslag til Lov om ændring af lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf m.v. (um at innføra skipan við fótfjøtur í Føroyum) sendandi til ummælis, men hendan broytingin samsvarar eisini væl við tann tankan um at í ávísan mun brúka fótfjøtur, heldur enn fongsling. Bæði tann broytingin og hendan eru gleðiligar, tí tað leggur dent á, at endamálið við rættarskipanini er rehabilitering og at minka um sannlíkindini fyri brotsverkum, heldur enn at revsa fyri at revsa. Báðar broytingarnar eru eisini av slíkum slag, at fíggjarliga byrðan fyri samfelagið er minni, og persónarnir kunnu vera til gagns fyri samfelag og nærumhvørvið.

Sum heild kann ein siga, at í einum lítlum samfelag sum Føroyum, hevur tað eyka stóran týdning, at leggja dent á væl grundaðar revsingar, sum virkar fyribyrgjandi frameftir. Brotsverk í einum so lítlum samfelag

LM-016/2023

kunnu hava stórar avleiðingar, og raka ein lutvíst stóran part av samfelagnum. Um sama mundi er tað eisini ein eyka stórur missur fyri samfelagið, bæði um ein, ið hevur framt brotsverk, ikki longur er ein virkin samfelagsborgari, og um brotsverk verða framd, ið gera at hin órættaði ikki er før/ur fyri at vera virkin.

Broytingar frameftir

Etiska ráðið fegnast um, at við hesum er komið á mál við at umseta revsilógina. Bara tað at tað nú er gjørligt hjá føroyingum, at lesa samlaðu revsilógina á føroyskum er í sær sjálvum stórt. Harumframt nýtir umsetingin í nógvum førum eisini eitt mál, ið er lættari at skilja enn danski upprunateksturin, ið eisini er ein góð broyting.

Etiska ráðið fegnast somuleiðis um tær broytingar, ið eru gjørdar, og, í tann mun tað hevur verið gjørligt, at ein hevur tillagað tekstin nakað til føroysk viðurskifti. Harumframt er tað ógvuliga gott lógararbeiði, at skipa fyri so nógvum hoyringum, at kunna so væl, og at inndraga so nógv sjónarmið, sum ein hevur gjørt við hesi tilgongdini.

Vit skilja á lagnum at ætlanin – nú hetta arbeiðið er við at vera komið á mál – er at fara undir at arbeiða víðari, og at smíða eina føroyska revsilóg, ið byggir á føroysk viðurskifti og umstøður. Etiska ráðið metir at hetta hevði verið ógvuliga gagnligt. Føroyska samfelagið er øðrvísi enn tað danska. Tað er minni kriminalitetur og minni álvarsamur kriminalitetur í Føroyum, og um sama mundið gera tøttu sambondini millum fólk í Føroyum – og sterka sosiala eftirliti – at umstøðurnar í Føroyum víkja nógv frá teimum donsku.

Tískil vónar Etiska ráðið, at hetta arbeiðið verður tað næsta innanfyri økið, ið politiska skipanin fer at raðfesta. Vit vóna eisini, at arbeiðshátturin og málið verður tað sama, sum tað hevur verið hagartil. Við eini føroyskari lóg kann ein í uppaftur størri mun tryggja, at lógin er skrivað á einum máli, sum vanlig fólk skilja. Ein kann somuleiðis leggja seg meira eftir rehabilitering og fyribyrging, og í størri mun byggja eina føroyska skipan upp um tað, at hjálpa fólki, ið eru komin út á eitt síðuspor – og tryggja at skipanin er kjølfest í føroyska samfelagnum.